# REBEKKA ETUR SEG FRÁ AUTISMU

EIN STRONG **KOSTÆTLAN** UTTAN **GLUTEN**, MJÓLK, **SUKUR** ELLA **UPPÍLATINGAREVNI** HEVUR BROYTT **LÍVIÐ** HJÁ SKJÓTT SEKS ÁRA GOMLU **REBEKKU**. HON VAR **HART** RAKT AV **AUTISMU**, MEN ER Í DAG **FØR** FYRI AT GERA **MEGINPARTIN** AV TÍ, SUM **JAVNGAMLAR** GENTUR **KUNNU**.



**KOSTUR**
Dorit Hansen
post@sosialurin.fo

– Tað er bara ein spurningur um tíð, so er tað viðurkent av øllum, at kostur ávirkar autismu. Og eg eri bangin fyri, at vit tá fara at hyggja aftur og øtast, hvussu hesi børn verða viðgjørd í dag.

Hetta sigur Monika Kunoy Sharp, mamma fimm ára gomlu Rebekku, sum við broyttum matvanum er sloppin undan nógvum av teim eyðkennum, sum fylgja við autismu. Rebekka er skjótt seks ár, leggur hon sjálv dent á, tá undirritaða vitjar. Hon og mamman eru einsamallar inni, og samskiftið teirra millum og spæl hennara á gólvinum tykjast ikki ólík tí hjá øðrum fimm ára gomlum gentum.

Men Rebekka Kunoy Sharp er ikki ein heilt vanlig genta, og tað, sum er náttúrligt fyri tey flestu, er ikki komið av sær sjálvum hjá henni. Tá Rebekka var trý ára gomul, fekk hon staðfest álvarsliga autismu, og útlitini vóru alt annað enn góð.

### Onkur stjól dóttrina

Autisman byrjaði, tá dóttirin var 14 mánaðar gomul, greiðir Monika frá. Tá dugdi hon væl at ganga, hon spældi og pjákaði sum onnur eitt-ára-gomul børn. Henni dámdi væl peikibøkur, og hon dugdi eisini at nevna fleiri av lutunum, sum vóru í bókunum.

– Eg haldi, at hon hevði eini 20 orð, tá alt knappliga broyttist. Hon misti javnvágina og byrjaði at detta, og hon gavst at tosa og søkja samband við okkum. Tað var, sum um onkur var farin av stað við dóttrini, sigur Monika.

Monika og maðurin, Tim, búgva í Filipsoyggjunum, har tey arbeiða sum trúboðarar. Tey búgva í sunnara parti av landinum, og tá Rebekka broyttist, fóru tey beinanvegin til høvuðsstaðin, Manilla, fyri at kanna, hvat henni bagdi. Hon var kannað av góðum læknum, men einki var at síggja í oyrum, heila ella blóði, og læknarnir hildu, at hon var bara eitt ár, og nógv duga ikki so nógv, tá tey eru eitt.

– Men vit kendu sjálvandi dóttur okkara betur enn læknarnir, og vit vistu, at har var okkurt galið, sigur Monika.

Tey valdu so at koma heim í farloyvi fyri at fáa hana kannaða fyri autismu her heima, og Rebekka varð skrivað upp til kanning á Sernámsdeplinum. Men bíðitíðin var meir enn eitt ár, so Monika og maðurin valdu at fara til Danmarkar at fáa dóttrina kannaða uppá egna rokning.

– Vit vistu, at vit høvdu ikki tíð at bíða, tí at tað er ógvuliga týdningarmikið, at børn við autismu verða hjálpt so tíðliga sum møguligt.

Á Center for Autisme kundi danski serlæknin, Lennart Pedersen, staðfesta tað, sum tey óttaðust. Rebekka hevði autismu, og hon var hart rakt.

### Autisma ein tarmsjúka

Vanliga hugsanin um autismu er, at talan er um neurologiskt órógv, tað vil siga sjúku, sum situr í heilanum. Men tað eru eisini læknar og granskarar í autismu, sum halda, at autisma er eitt úrslit av eitran, sum serliga sæst aftur í tarmunum.

Tá Monika og maðurin fóru aftur til Filipsoyggjarnar eftir at hava fingið niðurstøðuna frá danska stovninum, steðgaðu tey í Manilla í eina tíð. Hetta bæði tí at politiskur ófriður var í suður Filipsoyggjunum, og tí tey ynsktu at læra meira um autismu og kanna hvørjar viðgerðarmøguleikar, Rebekka kundi fáa har.

Rebekka slapp inn á ein góðan serskúla fyri børn við autismu, og Monika og maðurin lósu alt, sum tey kundu fáa hendur á um sjúkuna.

> ***Hvørki í Føroyum ella í Danmark hevði nakar nevnt fyri okkum, at maturin kundi ávirka autismu, men tá eg fór at leita á netinum, sá eg nógvan lesnað um hetta.***

– Hvørki í Føroyum ella í Danmark hevði nakar nevnt fyri okkum, at maturin kundi ávirka autismu, men tá eg fór at leita á netinum, sá eg nógvan lesnað um hetta. Rebekka fekk góða hjálp á skúlanum, men hon bara versnaði. Tí avgjørdu vit at royna matin, greiðir Monika frá.

Tey funnu út av, at tað vóru læknar, sum hildu at autisma kann lekjast, millum annað við broyttum matvanum. Ein slíkur DAN (Defeat Autism Now) lækni var í Manilla, og hann kannaði Rebekku.

– Tey tóku royndir av bæði skarni, urini, blóði og hári, og tað vísti seg at royndirnar vóru sera ljótar. Rebekka var millum annað ikki før fyri at niðurbróta skaðilig evni, sum hópaðu seg upp í kroppinum, greiðir Monika frá.

### Ógvuslig byrjan

Læknin mælti til ein serliga kostætlan, sum verður nevnd SCD (specific carbohydrate diet), og tann 26. januar 2009 byrjaði nýggja lívið við nýggjum mati. Monika, Tim og døtrarnar vóru tá flutt inn aftur í ættarbólkin, har tey arbeiða, og tey høvdu ein stuðul við til Rebekku, sum arbeiddi við henni seks tímar hvønn dag, men hóast stuðulin gjørdi eitt stórt arbeiði, so var tað bara nokk til at bremsa afturgongini eitt lítið sindur.

– Kroppur hennara var eitraður og doyvdur, tí høvdu venjingar lítla og onga ávirkan. Eingin rakk inn til hennara, sigur Monika og greiðir frá, hvussu kosturin skuldi lekja tarmarnar við at hungra skaðiliga vøksturin í tarmunum og uppbyggja gagnliga flora

Tað var alt annað enn lætt at broyta matvanar. Allur maturin mátti gerast frá grundini, ongar liðnar vørur kundu